# Vaska bilin uttan kemisk vaskievni

**“ENJO International” í Eysturríki er ein av heimsins fremstu fyritøkum innan effektiva og umhvørvisvinarliga reingerð. Alt hetta snýr seg í høvuðsheitum um vaskiklútar, ið eru gjørdir úr serstøkum tægrum. Vaskievnið er einans kalt vatn**

Í staðin fyri at selja ymisk vaskievni til bilin, sum t.d. til lakkeraðu flaturnar og felgurnar, eins og kabinu og rútar, hevur ENJO sergjørdar klútar til øll hesi endamál og harvið alla reingerð av bilinum. Bileigaranum nýtist bert at gera ein íløgu í nakar klútar og sleppur heilt undan at keypa sápu og onnur kemisk vaskievni.

Vaskievnið er kalt vatn, og er tað heilt ókeypis. Tað snýr seg um at nýta teir røttu klútarnar til rætta endamálið. Ein klútur er til at vaska bilin uttan, ein annar at turka bilin við, ein til rútarnar og ein til kabinuna o.s.fr.

Um bilurin er rættuliga skitin er eingin trupulleiki at vaska hann við ENJO-klúti saman við vatni. Klúturin, ið tekur bæði skitt og asfalt, er eisini sera væl egnaður til felgurnar. Í mun til onnur vaskievni er eingin bíðitíð við ENJO-klútinum, einki vaskievni sum skal sprænast upp á fáa tíð at virka.

ENJO-vørurnar verða framleiddar av “ENJO International” í Eysturríki og verða einans seldar av útbúnum konsulentum, sum geva kundum røttu vegleiðingina. Produktini kunnu nýtast í øllum húsarhaldinum, og høvuðsendamálið er fara væl við umhvørvinum.

Alt hetta snýr seg í høvuðsheitum um vaskiklútar, ið eru gjørdir úr serstøkum tægrum. Hetta ger at nýtslan av sápu og øðrum kemikalium kann minkast við 90 prosentum ella meira.

Sum fyritøka leggur Enjo stóran dent á at verja umhvørvið og tey hava eina fullfíggjaða reingerðingsskipan, sum kann brúkast í húsarhaldinum, á stovnum, á virkjum ella hvar tað skal vera.

Í Føroyum er tað ENJO-Føroyar v. Tórhardu Bláhamar, Tjarnarlág 41, Tórshavn, sum er ENJO aðalumboð, telefon 314353 ella 226603. Fleiri ENJO umboð finnast á heimasíðuni www.enjo.fo

Av tí at ein partur av tekstinum í hesi grein manglaði í blaðnum Bilar seinasta fríggjadag, prenta vit greinina um aftur



*ENJO-klútirin tekur allan skittin*



*Vaskievnið er kalt vatn. Tað snýr seg um at nýta teir røttu klútarnar til rætta endamálið*



*Bileigaranum nýtist bert at gera ein íløgu í nakar klútar*




## Heimsins størsta bilskip

Copenhagen Malmø Port (CMP) hevði í herfyri vitjan av heimsins størsta bilskipi. Talan er um skipið Toledo hjá reiðarínum Wallenius Wilhelmsen Logistics.

Tað tók tveir dagar at tøma skipið fyri teir næstan 3.000 nýggju bilarnar frá Toyota, Honda og Mitsubishi.

Hetta var størsta mongd av bilum, sum Copenhagen Malmø Port nakrantíð hevur tikið ímóti.





**SEAT CORDOBA TIL SØLU**

Seat Cordoba, frá juli 2003
Nýggjasta modellið
Sera økonomiskur, væl útgjørdur

Vegna flyting selist bilurin fyri kr. 85.000,-.
Ring 21 97 97

- **Umvæling av tryggingarskaðum og privat skaðum**
- **Vit umvæla øll bilmerki**
- **Klárgering til sýn**
- **Bremsur, útstoyt, stoytdoyvarar, rustarbeiði o.m.a.**



**Ring og fá eitt tilboð**

**Sp/f Plátuverkstaðið**
**Falkavegur · Tórshavn · Tel 321778 ella 221778**
**Teldupostur: plv@plv.fo**